## Icelandair gott umdømi

Íslendska flogfelagið Icelandair fær góð ummæli í einari nøgdsemiskanning, sum evropeiski flogfelagsskapurin AEA hevur almannakunngjørt. Sambært kanningini var Icelandair tað einasta av flogfeløgunum, sum ikki avlýsti nakra ferð í tíðarskeiðinum frá november í fjør til mars í ár. Tá talan var um at halda fráferðar- og komutíðir á longum ferðum, var Icelandair á øðrum plássi og á triðja plássi, tá talan var um meðallangar og stuttar ferðir. AEA sigur, at fer ella lendir eitt flogfar minni enn 15 minuttir frá tí, sum stendur í ferðaætlanini, verður tað roknað um, at flogfarið hevur hildið ferðaætlanina.



## Svínakrímið breiðir seg

Myndugleikarnir í norðara parti av Kanada hava staðfest 30 nýggjar tilburðir av svínakrími, og sostatt eru 234 tilburðir nú skrásettir í økinum, skrivar CBS News. Sagt verður, at 21 av teimum smittaðu hava fingið viðgerð á sjúkrahúsi, og at 15 teirra eru sloppin heimaftur. Myndugleikarnir hava mælt frá, at skúlar, dagstovnar ella verksmiðjur lata aftur, men at fólk, sum halda seg hava fingið sjúkuna, skulu venda sær til lækna at biðja um ráð. Kanadisku myndugleikarnir siga, at í øllum landinum hava teir staðfest næstan 6.500 tilburðir av svínakrími, og at 15 fólk eru deyð av sjúkuni. 400 hava fingið viðgerð á sjúkrahúsi.

# Størsti sáttmáli um skipasmíð í Føroya søgu



**Tey tvey supply-skipini, sum Supply Service í Leirvík fær í ár, kosta tilsamans meira enn eina hálva miljard krónur. Triðja skipið, sum felagið eisini hevur sáttmála um, er í løtuni eitt sindur óvist orsakað av støðuni á fíggjarmarknaðinum. Men kemur hetta skipið eisini, verður talan um størstu skipaíløgu í Føroya søgu – og størri enn íløgan við Norrønu á sinni**

SKIPABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sigast kann ikki annað enn, at leirvíkingar saman við góðum kreftum her heima og uttanlands rættiliga havt spílað seg út í sínum ætlanum innan supply-vinnu. Íløgurnar, sum eru ætlaðar í trimum nýbygningum, eru tær størstu nakrantíð í føroyskari skipasøgu.

Fyrsta skipið av tveimum kemur á Havnina leygardagin, og seinni í heyst kemur ætlandi næsta skipið, um alt gongur sum ætlað.

Sáttmáli er eisini um eitt triðja skip, men støðan á altjóða fíggjarmarknaðinum ger, at ein ávísur ivi er um henda sáttmála beint í løtuni. Øll vita, hvussu tað hevur gingist fleiri bankum og fíggingarstovnum kring um í heiminum seinasta árið og millum teir, sum stóðu aftanfyri verkætlanina, var Landsbanki Íslands.

Tað er annars Eik Banki í Føroyum, ið stendur sum samskipari av fíggingini av stóru íløgunum, sum leirvíkingar saman við øðrum hava gjørt og arbeiða við.

Høvuðsfelagið aftanfyri alt hetta byggivirksemi er Supply Service í Leirvík.

Felagið, ið eigur fyrsta supply-skipið Eldborg, sum kemur leygardagin, er P/F Eldborg, og síðan er tað P/F 6. September 2007, sum kemur at eiga næsta skipið og ætlandi triðja skipið eisini.

Íløgan, sum Supply Service soleiðis ger í hesi bæði fyrstu skipini, liggur omanfyri hálva miljard krónur í okkara peningi. Taka vit so eisini sáttmálan um triðja skipið við, verður talan um íløgu, sum er størri enn íløgan var eitt nú í Norrønu, sum var størsta einstaka skipaíløga í Føroyum.

Supply Service gjørdi ikki allar sáttmálarnar í somu løtu, men yvir stutta tíð, og tí kunnu vit av røttum siga, at henda íløgan tilsamans er hin størsta skipaíløgan í Føroya søgu nakrantíð.



*Eldborg á royndartúri – fyrsta skipið av trimum hjá Supply Service í Leirvík*

### Stór umsiting

Orsøkin til, at felagið í Leirvík gjørdi av at gera sáttmála um trý supply-skip um somu tíð og at kalla eftir somu tekningum, er, at slíkt virksemi krevur lutfalsliga nógva umsiting, og tí verður raksturin av slíkum felag hugsandi eisini skilabetri og rationellari, tá talan er um fleiri enn eitt skip – og helst ikki minni enn trý skip.

Tað hevur verið ógvuliga strýggið hjá teimum fólkum, sum standa aftanfyri Supply Service, at fáa allar góðkenningar til vega til virksemi í hesi vinnu. Føroyar eru smáar innan tænastuveiting í oljuvinnu, og krøvini eru strongd og umfatandi. Tí er tað ikki bara sum at siga tað at sleppa framat í hesum høpi.

Supply Service hevur nógv og gott fólk aftrat sær og hevur soleiðis eisini roynt fólk innan supply-vinnu.

Eldborg hevur fingið ein fýra ára sáttmála um veitingar, sum felagið er sera fegið um. Soleiðis er virksemið hjá hesum skipi og teimum 22 monnunum, sum verða knýttir at skipinum, eisini tryggjað rúma tíð fram.

Á heimasíðuni hjá felagnum er møguleiki hjá fólki at søkja um kjans við supply-skipunum hjá leirvíkingum, og felagið dylur ikki fyri, at stórur áhugi hevur verið at sleppa við skipunum.

- Jú, vit hava fingið nógvar fyrispurningar, og tað er áhugavert, at áhugin fyri at manna skipini er so stórur, siga tey hjá Supply Service.

Tað eru ikki fiskimenn, sum sigla ella áður hava siglt hjá Justinussen-monnunum í Leirvík, sum nú fara at manna Eldborg. Førleikarnir, sum krevjast í oljuvinnu og fiskivinnu, eru ikki teir somu og allir, sum sigla við skipum hjá Sjóborg, hava kjans við verandi skipum – tað veri seg í ísfiska-ella rækjuvinnu. Soleiðis eru allir 22 menninir, sum nú verða knýttir at Eldborg, nýggir í felagnum í Leirvík.

### Móttøka í Havn

Skrokkurin á hesum fyrsta skipinum av tveimum – ella trimum – er smíðaður í Turkalandi, og síðan er skipið gjørt liðugt í Noregi.